

*Fyri einum góðum mánaði síðani lat Johan Joensen upp nýggja internetkafé upp í Fuglafirði og hann letur væl at undirtøkuni. – Undirtøkan hevur verið stak góð síðani byrjan. Í januar eitt sindur lakari, men kortini nóg mikið til at tað melur runt, sigur eigarin*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Internetkaféin í Fuglafirði góða undirtøku

*Nýggja internetkafein Vega, sum lat upp í fjør, hevur fingið sera góða móttøku, sigur eigarin Johan Joensen*

Sveinur Tróndarson

Tað grør um gangandi fót á KT-økinum og internetkaféirnar gerast alsamt fleiri.

Fyri ikki so langari tíð síðani lat ein slík upp í Fuglafirði - Vega kallast hon - og eins og allar hinar, hevur hon fingið serstakliga góða undirtøku.

### Gamal dreymur

Tað er Johan Joensen, úr Fuglafirði, sum eitur internetkaféina Vega, og hóast internetið ikki er so gamalt í Føroyum, so er tankin um eina internetkafé í Fuglafirði ikki nýggjur.

– Eg havi hugsað um tað í nøkur ár, men fekk tað ikki at hanga saman fíggjarliga fyrr enn nú, sigur Johan Joensen.

Hann er ikki ókendur á telduøkinum, tí hann rekur JJ-Teld, sum umframt sølu av teldum, í høvuðsheitum tekst við netumsiting og heimasíðugerð.

– Eg havi so lagt eitt sindur til síðis í nøkur ár, og í heyst valdi eg at gera álvara av ætlanunum, greiðir Johan frá.

*Ert tú einsamallur um Vega?*

– Ja, tað eri eg. Fleiri hava víst áhugað at vera við í ætlanini, men tá til stykkis kom helt eg, at tað var frægast at vera einsamallur um tað, sigur Johan.

### Góða undirtøku

Tað var eftir øllum at døma tørvur á onkrum tílíkum í Fuglafirði, tí tað vísti seg beinanvegin, at nýggja internetkaféin fekk stóra undirtøku.

– Serliga tey ungu vístu stóran áhuga, men tað eru ikki bara tey. Í vikuskiftunum eru eisini tilkomin fólk í kaféini, so tað er ein breiður brúkarabólkur, greiðir Johan frá.

Tá vit spyrja hvat tað er tey gera, sigur hann at tað er so øgiliga ymiskt.

– Hjá teimum yngru eru tað serliga spølini og internetið, sum hava áhuga, meðan tey eldru koma inn á gólvið tí tey skulu skriva eitthvørt út, ella tí tey skulu kanna teldupostin, sigur Johan.

Annars hava verið nógvir sjómenn í Fuglafirði seinastu tíðina, og teir hava eisini brúkt Vega nógv.

Johan greiðir frá, at útlendsku sjómenninir st.økka inn á gólvið at stytta sær stundir, og til tað eru telduspølini góð.

– Men felags fyri tey allarflestu er, at teimum dámar væl at tjatta á internetinum, leggur Johan afturat.

### Góð útgerð

Útgerðin hjá eini internetkafé er sjálvsagt sera týdningarmikil.

Í so máta er Vega sera væl fyri, sigur Johan. Hann hevur útvegað sær 20 HP teldur, og tær eru allar 500 Mhz. Hetta eru skjótar teldur, sum eru slitsterkar, og eisini teldur, sum halda prísin.

– Menningin á KT-økinum gongur sera skjótt, og tí kann væntast, at hesar teldurnar verða skiftar út tá gott og væl eitt ár er farið, men tá er ikki óhugsandi, at tær kunnu seljast til skúlabrúks, sigur Johan.

Hann leggur dent á, at fyri tað at teldurnar eru brúktar á kaféini, eru tær væl viðfarnar, og tí er tað funnin fressur hjá skúlum og kommunum, at keypa slíka útgerð brúkta.

– Men her í kaféini mugu vit alla tíðina hava ta nýggjastu útgerðina, leggur Jóhan afturat.

### Skeiðvirksemi í vetur

Hóast Vega er ein internetkafé, so hevur Johan Joensen ikki ætlanir at avmarka seg til »kafé-virksemi«.

Hann gongur longu nú og hugsar um, hvønn tátt hann skal taka upp, og sum tað sær út í løtuni, so er ikki óhugsandi, at hann fer undir skeiðvirksemi í vetur.

– Eg ætli mær at fara undir skeiðvirksemi av slíkum slag, sum í løtuni ikki fæst í Føroyum, sigur Johan.

Hann sigur, at tað í løtuni ikki ber til at taka skeið viðvíkjandi stýriskipanum, og tað ætlar hann sær at broyta.

*Skalt tú sjálvur halda skeiðini?*

– Nei. Eg havi fingið fatur á fólki uttanlands, sum kemur til Føroya at halda skeiðini.

*Men hvat við teldukoyrikortum?*

– Tað er ein møguleiki, men tað er ikki greitt hvussu tað verður við tí, sigur Johan.

Til endans kunnu vit annars siga teimum, sum hava hug at vitja inn á gólvið hjá internetkaféini Vega í Fuglafirði, at kaféin er opin allar dagar frá klokkan 15 til 24. Fríggjadag og leygardag er kortini opið til klokkan fýra um náttina og sunnudag verður latið upp klokkan 16.

Og fyri at tey skulu finna á mál kunnu vit enda við at siga, at Vega heldur til í bygningum har tógvhandilin hjá Marjun heldur til.

# Flyta kanska Orbits niðurundir

*Nú formula.fo hevur keypt gamla bygningin hjá Demich - har Rokkjallarin hevur hildið til í seinastuni - er møguligt at kaféin verður flutt niðurundir, so hon gerst meira atkomilig hjá rørslutarnaðum*

Sveinur Tróndarson

Internetkaféin Orbits, kann av sonnum kallast pionerur. Hon var nevniliga tann fyrsta av sínum slag í landinum, men síðani eru fleiri komnar afturat.

Um dagarnar fréttist, at Rokkjallarin gevst, og samstundis fréttist, at KT-fyritøkan formula.fo, sum er ein av eigarunum í Orbits, hevði keypt bygningin.

Áki Johansen, frá formula.fo, sigur við Sosialin, at tað enn ikki er heilt avgjørt hvussu bygningurin skal brúkast.

– Ymsar ætlanir eru frammi, men tað er ikki óhugsandi, at Orbits flytir niðurundir, har Rokkjallarin fyrr helt til, sigur Áki.

Hann vísir á, at sum er hava rørslutarnað ongan møguleika at sleppa í kaféina, og tað er ein av orsøkunum til, at teir hugsa um at flyta niðurundir.

### Stórur áhugi

Tað hevur annars verið rættiliga stórur áhugi fyri Orbits síðani hon lat upp, men dagarnir eru misjavnir, sigur Áki.

Hann vísir á, at Orbits skal kappast við øll onnur tiltøk, sum eru í Havnini, og tað eru dagar, har næstan einki fólk er í kaféini.

Tað eru góðir dagar, men so eru eisini dagar, har tað er púra oyðið. T. d. tá konsertir eru, ella tá topphondbóltur er í høllini á Hálsi. Tað sæst beinanvegin hjá okkum, sigur hann.

Hóast tað letur Áki Johansen ikki illa at, tí í meðal er undir tøkan nóg góð til at tað melur runt.

*Fyri næstan einum ári síðani lat Orbits upp internetkafé - ta fyrstu av sínum slag í Føroyum. Hóast undirtøkan er á eini góðari leið, og kaféin liggur í høvuðsstaðnum, so heldur Áki Johansen ikki at grundarlag er fyri fleiri slíkum í hvørji bygd. – Til tað er marknaðurin ov svikaligur, sigur hann*

**Mynd: Jens Kristian Vang**





# Læknaráðið stuðlar sjúkrahúsleiðaranum

Læknaráðið, sum er eitt læknafaktligt forum, har allir læknar á Landssjúkrahúsinum eru limir, hevur á fundi í dag viðgjørt ta kreppu, sum er íkomin av peningatrotinum á sjúkrahúsinum.

Læknaráðið heuvr samtykt at senda út hesa yvirlýsing:

Ein ov lág játtan og manglandi leiðslubygnaður eru grundleggjandi trupulleikarnir á Landssjúkrahúsinum.

Læknaráðið á landssjúkrahúsinum hevur konstaterað, at sjúkrahúsinum í mong ár hevur trotið pening við endan av fíggjarárinum. Hóast fleiri dugnaligir sjúkrahúsleiðarar og sjúkrahússtjórar hava roynt teirra besta at halda fíggjarkarmarnar, hevur hetta ikki eydnast nøkrum. Neyðugt hevur altíð verði at seta sparitiltøk í verk við endan av fíggjarárinum. Vanliga hevur ikki verði trupult at fingið játtan til at dekka tað eftirverðandi undirskotið, tí myndugleikarnir hava viðurkent, at peninganýtslan hevur verði neyðug og tiltrongd.

Seinastu árini er støðan broytt við tað, at játtandi mynduleikin noktar at viðurkenna eitt undirskot og at geva ta neyðugu meirjáttanina. Endin av fíggjarárinum er vorðin eitt afturvendandi drama, orsakað av, at sjúkrahúsleiðslan ikki hevur sæð sær aðrar útvegir, enn at boða frá uppsøgnum og øðrum drastiskum sparitiltøkum.

Soleiðis var aftur í ár. Hóast talið av fráboðaðum uppsagnum ikki var so stórt, sum onkur undanfarin ár, var sjúkrahusleiðarin lagdur undir at verða ódugnaligur og illoyalur og hóttur við uppsøgn.

Læknaráðið harmast og mótmælir at sjúkrahúsleiðarin, eftir ráðsins meting ógrundað, einnsamallur hevur fingið ábyrgdina fyri fíggjarliga standin á Landssjúkrahúsinum. Ráðið metir at sjúkrahúsleiðarin, undir givnu umstøðum, ikki hevði annað í at velja.

Hvørjar fyritreytir eru neyðugar fyri at stýra einum sjúkrahúsið?

Ein sjúkrahúsleiðari má hava **stýringsamboð** at stýra við. Tað vil fyrst og fremst siga eina **strukturerаða leiðslu (leiðslubygna),** sum fyriskrivar hvørjar diagnostiskar og viðgerðarligar funktiónir skulu vera og, hvussu hesar skulu útinnast og detailstýrast. Røktin, sum er tengd at hesum læknaligu funktiónum, kann so dimensionerast eftir tí kravið, sum tann einkulta diagnosuproceduran/viðgerðin setur.

Ein tílíkan leiðslubygna fekk Jákup Mørkøre ongantíð, og hevði hann tí avmarkaðar møguleikar at stýra aktivitetinum á sjúkrahúsinum. Sjúkrahúsleiðarin fekk, sum fyrstu uppgávu sum leiðari at gera ein leiðslubygna, og legði hann eitt uppskot um ein slíkan fyri landsstýrið, uppskotið var væl at merkja í samsvar við tilráðingar frá útlendskum konsulentvirkjum, sum landsstýrið sjálvt hevði keypt ráðgeving frá. Talan var um ein einstreingjaðan leiðslustruktur. Hetta uppskotið var vrakað av landsstýrinum, og eingin annar leiðslubygnaður er etableraður.

Onnur fyritreytin fyri at kunna stýra er **gjøgnumskygni** heilt niður til einkultfunktiónir á deildunum. Til hetta er best at hava eitt teldu-kervi (intra-net) har útreiðslurnar frá øllum útreiðslukrevjandi aktivitetum (serliga lønum til starvsfólk) kunnu samlast í relevantar konti og lesast realtime minst 1 ferð um vikuna, helst dagliga.

Triðja fyritreytin er, at leiðarin hevur **loyalan stuðul** frá bæði undirordnaðum- og serliga yvirordnaðum myndugleikum. Hann má hava ráðgeving og kompetenta fakliga vegleiðing í hvussu, hann best kann stýra, fyri at uppfylla krøvini um t.d. sparingar. So vítt læknaráðið hevur skilt aktuellu støðu, manglaði hesin stuðul frá Almanna- og Heilsumálastýrinum. Sjúkrahúsleiðarin bleiv, so vítt Læknaráðið er informerað, konfronteraður við eitt indiskutabult krav um sparingar.

Fjórða og mest avgerandi fyriteytin fyri at kunna halda ein játtaðan fíggjarkarm er, at **játtanin er realistisk,** t.v.s. tað má kunna bera til at nøkta eftirspurningin eftir heilsuligum veitingum fyri tann játtaða pengin. Um tað ber til at reka Landssjúkrahúsið fyri tær játtaðu 232 mill kr., er tað eingin, sum veit. Hetta orsakað av áðurnevnda manglandi leiðslubygnaða og manglandi gjøgnumskygni.

Tó kann sláast fast, sum royndirnar gjøgnum árini prógva, at við tí økjandi aktiviteti, sum hevur verði gjøgnum árini, og við núverandi leysa strukturi, ber tað **ikki** til.

Tað er eitt væÌdokumenterað faktum, at aktiviteturin, t.v.s. talið av veitingum (innleggingar, ambulantar viðtalur, og aðrar veitingar eitt nú talið av laboratorie- og røntgenkanningum fyri primersektorin) er vaksið ár um ár. Eisini er kostnaðarstøði vaksi gjøgnum árini (lønir og prísir), nýggir viðgerðarhættir krevja bæði pening og starvsfólk og tørvurin á teknologi er í stórum vøkstri (aktuelli tørvurin fyri innkeypi og



endurnýggjan av tólum er av læknaráðnum uppgjørt til í minsta lagi 25 mill. kr... Okkara "tólkonto" er, sum er, 1,5 mill. kr.).

Læknaráðið metir, at við núverðandi (manglandi) strukturi og við støðugt økjandi aktiviteti og kostnaðarstøði, er játtanin til Landssjúkrahúsið **ov lág**.

Sum aktuelt dømi kann nevnast, at játtanin komandi ár til lønir dekkar ikki so mikið sum eina framskriving av fyrrverandi játtan (t. v. s. 183837 tkr + tey 6,36%, sum eru sáttmálasettu lønarhækkingarnar).

Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum heitir á Føroya Landsstýrið, sum fyrsta stig, at fáa ein leiðslustruktur etableraðan á Landssjúkrahúsinum. Ikki fyrrenn tá verður gjørligt at gera eina heildarmeting av tørvinum fyri diagnostiskum, terapeutiskum og røktarligum aktiviteti og at gera neyvari kostnaðarmetingar av hesum virksemi.

**Landssjúkrahúsið. 2000-01-20**
**Vegna Læknaráðið á Landssjúkrahúsinm**
**Heðin Thomsen,**
**yvirlækni**
**Formaður**

# Minningarorð um Kjølv Egeland

*Fyrrverandi norskur mentamálaráðharri*

Havi nústani frætt, at fyrrverandi norski mentamálaráðharrin Kjølv Egeland er deyður 30. desember 1999.

Við honum er ein góður vinur og Føroyavinur farin. Hann var ættaður úr Haugesund, men starv sítt hevði hann í Stavanger. Hann var skúlamaður burturav og nógv ár studentaskúlarektari.

Kjølv Egeland hevði stóran áhuga fyri mentan og var sera virkin í tí sum nevnt var Distrikts Norge, ið stríddist fyri, at ikki alt mentunarvirksemi miðsavnaðist í Olso, men fevndi um alt landið, og hevur hetta eydnast sera væl.

Virkin var hann eisini í politikki í arbeiðaraflokkinum, og endaði hann sum ráðharri í kirkju-, kenslu- og mentamálum, ið tá var nógv størsta ráðharrastovan í Noreg.

Sjálvur kom eg at kenna Kjølv Egeland á ráðharrafundi í Kungälv í Svøríki í januar 1976, har støða skuldi takast til, um Norðurlandahús skuldi byggjast í Føroyum.

Tað er eingin loyna, at ivi var um málið, bæði í Føroyum og í Norðanlondum, og var norska embætisverkið kanska tað mest ivasama.

Tað vísti seg tó á fundinum, at flestu ráðharrarnir vóru fyri, og tók Noreg eisini undir við at byggjast skuldi, og virkaði við fullum huga fyri at fremja ætlanina. Eg veit, at tað gleddi Kjølv Egeland nógv, at hann sum formaður fyri norðurlensku mentamálaráðharrunum fekk høvi at handa virðislønirnar, tá arkitektakappingin var lokin.

Tá Noreg skuldi velja lim í stýrið fyri Norðurlandahúsið var Kjølv Egeland farin frá sum ráðharri, og hann varð valdur sum fyrsti norðmaður.

Kjølv Egeland var maður, ið av heilum huga fór undir tað, ið honum varð litið upp í hendur, og soleiðis var eisini her. Kunnleikin hann hevði fingið bæði sum ráðharri og í tí at spjaða mentaninna innanlands, kom Norðurlandahúsinum tilgóðar. Ansast skuldi eftir, at húsið ikki varð ov fínmentað, men sanniliga eisini, at tað ikki gjørdist eitt vanligt samkomuhús. "Kvalitet fremfor kvantitet", var hann mangan vanur at siga.

Kjølv Egeland var góður pianistur og gleddi tað hann nógv, at stóri salurin, ið var serliga ætlaður til tónleik, royndist væl.

Hesi árini hann var í stýrinum fekk hann serligan tokka til Føroyar, og gleddi hann seg til hvønn stýrisfund, ið hildin varð her. Hann var vanur at siga, hálvavegna í skemti, at hann kundi hugsa sær at liva síni seinastu ár her.

Ein sannur heiðursmaður er farin, og lýsi eg frið yvir minni hansara.

**Dánjal Pauli Danielsen**

# Russiskur føroyafrøðingur fyllir 75

Mánadagin 17. januar 2000 vóru 75 ár síðani russiski søgufrøðingurin, tjóðfrøðingurin og landafrøðingurin Genrikh Iosifovitsj Anokhin varð føddur í Jejsk við Azovska havið. Hann hevur umframt at granska Russlands søgu starvast við at lýsa lív og kor hjá teimum smáu tjóðunum í Sovjetsamveldinum og harafturat søgulig og samfelagslig viðurskifti hjá fólkunum í Norðurlondum, einamest í Noregi, Føroyum og Danmark. Genrikh hevur skrivað nógv, fakligar bøkur, vísindaligar ritgerðir og blaðgreinar. Ein av bókum hansara er einasta heildarlýsingin av Føroyum og Danmark. Genrikh hevur skrivað nógv, fakligar bøkur, vísindaligar ritgerðir og blaðgreinar. Ein av bókum hansara er einasta heildarlýsingin av Føroyum og føroyingum, ið út er givin í Russlandi, »øba istrivajg dozjdej«, Moskva 1966. Í Fróðskaparritum, 38.-39. bók, 1989-90 stendur grein eftir G.I. Anokhin, »Føroyingar í russiskum bókmentum«.

Genrikh Anokhin hevur sett fram nýggja teori um, hvussu statsskipan er íkomin í Novgorod í 9. øld. Í uml. 260 ár hevur tann hugsanin verið ráðandi millum søgufrøðingar, at novgorodsmenn í árinum 862 bóðu Rjurik (Hroerek) koma handan hav, helst úr Svøríki, við sínum varjagi (væringjum) at ráða og stýra í Novgorod, tí har hildu teir seg ikki sjálvar duga. Hetta ástøði hevur verið nevnt »normanska teoriin«. Genrikh heldur eftir drúgvar kanningar, ið hann hevur gjørt, vera sannlíkt, at teir, ið skipaðu Novgorodsríkið, vóru ikki skandinaviskir menn, uttan slávar. Um hetta ástøði hevur hann skrivað ritgerð í russiska tíðarritið »Tsjelovek« br, 4, 1994.

»Hvør í míni fótspor stígur, hann lær ikki allan tíð« er kvøðið. Náttina 14. juli 1938 tók NKVD pápa Genrikhs, og einki fréttist aftur um hann fyrr enn fleiri áratíggju seinni. Tá fekk sonurin at vita frá myndugleikunum, at faðirin varð skotin stutt eftir, at hann var tikin. Umsíðir, nú Stalin var burtur, fekk hann heiðursuppreising frá myndugleikunum, tí at hann var ikki sekur í nøkrum brotsverki, skrivaðu teir. Í seinna heimsbardaga var Genrikh í mótstøðurørsluni í Taganrog, sum týskararnir høvdu hersett. Seinni fór hann í mótstøðurørsluni í Taganrog, sum týskararnir høvdu hersett. Seinni fór hann í sovjetiska herin og var sum sersjantur við í bardøgunum á suðurhermótinum í Ukrainu. Men SMERSJ (sovjetskur mótnjósningarstovnur) fekk uppspurt, at Genrikh var ímóti Stalinstýrinum, og hann varð settur í sovjetska kz-legu 1944-45. Tá hann varð latin leysur haðani, var hann illa sjúkur og niðurundirkomin. Hóast tað royndi hann at sleppa inn á lærustovn at lesa søgu, sum hann frá ungum árum hevði verið hugaður fyrl. Myndugleikarnir vóru trekir at sleppa honum inn, men at enda eydnaðist honum at koma inn á undiversitetið í Dnjepropetrovsk. Tá hann hevði fingið prógv har, fekk hann av politiskum orsøkum kortini ikki loyvi at arbeiða við tí, hann hevði útbúgvið seg til, og fór at arbeiða sum ítróttalærari og bleiv eisini fjallaklintrari. Genrikh hevur staðið fyri kanningarferðum í fjøllum víðahvar í sovjetsamveldinum, m.a. í KAvkasus, í Sikhote-Alin eysturi ímóti Japanska havinum.

Í 1966 fekk Genrikh licentiatstig við Etnografiska instituttið há Vísindaakademii Sovjetsamveldisins og starvaðist hjá hesum stovni, til hann fór frá fyri aldur. Av tí at Genrikh var ikki limur í kommunistiska flokkinum, og pápin hevði verið »fólksins fíggindi«, sum tað æt í Stalintíðini, var í mong ár sýtt honum loyvi til at fara til londini vestanfyri, ið hann hevði kannað og skrivað um. Ikki fyrr enn í 1988 fekk Genrikh útferðarloyvi og slapp at gera ferð til Danmarkar og Føroya. Seinni var hann aftur í Føroyum, og hann hevur eisini verið í Noregi.

Genrikh Anokhin er limur í Geografiska felagnum hjá Vísindaakademii Russlands Internationala akademinum fyri samskipan av vísindum og Handilsvirksemi og Føroya Fróðskaparfelag.

Hann hevur givið Føroyum umtalu, ið vit kunnu fegnast um, í heimlandi sínum. Mangur føroyingur man minnast aftur á hugnaligar løtur inni hjá fagnarfólkunum Natasju og Heindriki í Moskva.



**Valdemar Dalsgaard**